# út at koyra

## Premacy diesel og 6 pers.



Til Mazda Premacy, i› er ein 5 persóna bilur, ber nú til at fáa innrætta› eitt setur á aftasta ra›, so pláss ver›ur til 6 persónar, eins og hann nú eisini fæst sum diesel.

Kelda: Motor Magasinet

## Uppsagnir í Stuttgart



DaimlerChrysler bo›ar frá at 800 starvsfólk skulu sigast úr starvi yvir tr‡ ár í evropeiska høvu›ssætinum sum er í Stuttgart

Kelda: Motor Magasinet

## Umhugsar at flyta



Lei›slan í bretsku Nissan bilverksmi›juni í Sunderland hóttir vi› at flyta framlei›sluna av Nissan Micra til Spania ella Fraklands. Orsøkin er ta› høga bretska gjaldoyra›.

Kelda: Motor Magasinet

GOODYEAR

# Goodyear vi› n‡ggjastu lamelltøkni



MAGNUS GUNNARSSON

Nú veturin nærkast, eru dekkframlei›ararnir komnir á markna›in vi› tí n‡ggjasta innan vetrardekk. Stór krøv ver›a sett til dekkini, i› skulu hava eina gummiblanding, sum ger at dekkini hava gott vegtak og gó›a framdrift í kava og ísi, eins og tey skulu klára seg væl í regni og tá turt er í ve›rinum.

### Goodyear UG 6

Hesi seinastu 20 árini hevur Ultra Grip rø›in hjá Goodyear fingi› sera gó› ummælir, har tey hava veri› royndarkoyrd í ísi og kava. Nú er Goodyear dekkfyritøkan komin á markna›in vi› n‡ggja lamelldekkinum, UG 6, sum teir vænta sær nógv av, og ver›ur at fáa í øllum vanligum støddum til persónbilar.

### 3D-BIS tøknin

Ta› serliga vi› UG 6 er, at Goodyear hevur fingi› patent uppá 3D-BIS tøknina (3 Dimensional-Block Interlocking System), sum ger ta› møguligt at lamellurnar vera 50 prosent longri, vi› 60 prosent meira lamellum. Eisini er nógv gjørt nógv burtur úr trygdini, og UG 6 dekkini eru gjørd solei›is, at V-TRED tøknin syrgir fyri at vatn og kavi ver›a beind burtur úr dekkmynstrinum beinanvegin. Frá Goodyear umbo›num, Super Dekk, frætta vit at prísirnir eisini ver›a kappingarførir.

# Baby-Jaguar í 2002

MAGNUS GUNNARSSON

Jaguar, i› nú hoyrir til Ford konsernina, eru í fer› vi› at menna ein n‡ggjan bil vi› loyninavninum X400, sum væntandi kemur at eita Jaguar T tá hann kemur á markna›in. X400 er bygdur yvir sama plattform sum n‡ggjasti Ford Mondeo, ein komandi Mazda 626 og tann amerikanski Lincoln LS4. Ætlanin er at Jaguar T ver›ur klárur í byrjanini av 2002. Hóast talan ikki er um nakran lítlan bil, hevur hann longu fingi› kelinavni›, baby-Jaguar.

Kelda: FDM / Motor




# Jaguar S-Type

MAGNUS GUNNARSSON

Jagur S-Type er ein stórur luksusbilur, sum minnir um Jaguar MK ll frá 60-árunum. Ta› eru ikki nógvir privatpersónar sum keypa bil í hesum prísklassanum. FDM hevur royndarkoyrt bilin á Jyllands Ringinum, og klára›i hann seg avbera væl. Umframt hendan 3.0 litur vi› V6 motori, i› kostar gott kr. 700.000,- í Danmark, fæst hann eisini vi› einum 4.0 litur V8 motori, men tá kostar hann næstan eina millión.

Kelda: FDM / Motor

### Jaguar S-Type 3,0 V6 Aut.

| | |
|---|---|
| Motorurin | 3.0 litur V6 238 hk. |
| 0-100 km/t | 8,5 sek. |
| Toppfer› | 226 km/t |
| Bensinn‡tsla | 8,5 km/l |
| Prísur í Danmark | kr. 690.000,- |






# út at koyra

# Manna millum var› bilurin róptur »Grísurin«

MAGNUS GUNNARSSON

Frá tí at fyrsti bilurin kom til Føroya í 1922 og fram til kríggi›, vóru flestu bilarnir Ford ella Chevrolet. Tó komu onnur bilmerkir inn ímillum, eitt nú ein Hanomag hjá Gudmund Mortensen, i› manna millum var› róptur "Grísurin".

### Hanomag til Tvøroyrar

Í arbei›inum hjá Føroya Ellisakførum vi› at savna tilfar til føroysku bilasøguna, kemur mangt áhugavert undan kavi. Eitt nú kom Hendrik Husgaard, versonur Wensel Petersen, vi› eini mynd, har børn hjá Wenzel sita í einum lítlum 2 persóna bili.

Ein, sum hevur gjørt eitt stórt arbei›i vi› at kanna gomul skjøl um teir fyrstu bilarnar, er Hergeir Petersen í Havn. Hann fann fram til, at ein "Hanomag lille bil" var› seldur til Gudmund Mortensen á Tvøroyri í 1928. Skjótt vísti ta› seg, at hetta var sami bilur. Í 75 ára minnisritinum hjá N.J. Mortensen var mynd av Gudmund Mortensen í bilinum saman vi› fleiri børnum. Vi› at kanna ví›ari, hava vit funni› fram til søguna um hesar Hanomag bilarnar.

### Fyrsti Honomag bilur

Hanomag fyritøkan, Hannoverische Maschinenbau AG, var› stovna› í 1835. Teir byrja›u vi› at gera arbei›sambo›. Seinni bleiv fyritøkan kend fyri framlei›sluna av lokomotivum, jarnbreytavognum og traktorum. Fyrsti bilurin, teir gjørdu, var hesin Hanomag 2/10, i› var› s‡ndur fram á Berlin Motorshow í 1924. Hetta var ein lítil bilur til 2 fólk, vi› einum 1 syl. motori, 499 ccm. og 10 hk. Teir fyrstu vóru roadster modell uttan tak. Í 1926 kundi 2/10 fáast sum inniloka›ur vi› navninum "Zweisitzer Limosine". So løgi› ta› enn ljó›ar, var› hesin eisini brúktur sum h‡ruvognur. Modelli› var› gjørt frá 1924 til 1928, og tilsamans vór›u framleiddir 15775 bilar. Í T‡sklandi var› hetta slagi› av bilum nevnt motorsúkklubilar. Fram til kríggi› gjørdi Hanomag fleiri sløg av persónbilum, men eftir kríggi› framleiddu teir mest vøru- og lastbilar. Navni› Hanomag var› strika›, tá fyritøkan var løgd saman vi› Daimler-Benz í 1973.

### Um fyrsta bilin í Su›uroy

Fyrsta bilin á Tvøroyri, sum eisini var fyrsti bilur í Su›uroynni, átti Niels Juel Mortensen, pápi Gudmund. Hetta var ein Ford, sum var› keyptur í apríl 1924. Í á›ur nevnda 75 ára minnisritinum hjá P/F N.J.Mortensen grei›ir Hjørleif Enni, i› er føddur í 1916, solei›is frá um bilin:

Fyrsta bilin á Tvøroyri átti Niels Juel. Hetta var ein 2-tons bilur, og eg minnist at eitt øgiligt fólk var samankomi›, tá hann kom upp á land. Magnus Bærentsen - vit róptu hann Magnus bakaran - hann var slekta›ur av Sundi, var› tí eisini róptur Magnus á Sundi, hann var í handlinum hjá Niels Juel og var tann fyrsti, sum koyrdi hendan bilin, og Martin hjá Haldor, Martin Jespersen, og tá i› koyrt var›, mátti ansast væl eftir, tí vegurin tá var smalur, so har fekk eingin veri› á vegnum uttan bilurin og fólk máttu tískil sleppa sær til viks. Ein herur av óvitum plagdi at hanga uppi í bilinum. Eg veit ikki, hvussu skjótt, i› koyrt var›, neyvan mundi ta› vera meira enn einar 20 km um tíman, tí vegirnir vóru smalir, og so vóru eisini brúgvarnar at hugsa um.

Vit kunnu leggja afturat at næsti bilurin í Su›uroynni, i› kom í oktober 1925, var eisini ein Ford til J.Dahl í Vági.



*Vit halda at hendan myndin er tikin uttanfyri hjá Wenzel Petersen í Quillingsgar›i, vi› gar›in hjá Ríkisumbo›num. Bilurin, i› er nr. 3, hevur tvær lyktir á skermunum, ísta›in fyri eina í mi›juni. Bilurin aftan fyri er helst ein hjá Wenzel Petersen*



*Her hava vit ein Hanomag 2/10 Zweisitzer Limosine. Hetta hava veri› sera haldgó›ir bilar, tí í 1955 koyrdu yvir 160 av hesum modellunum í dagligu fer›sluni í T‡sklandi*



*Hanomag 2/10 er ein lítil og lættur bilur. Sum sæst á kølirivunum á sí›uni, er motorurin aftanfyri setri. Eisini er eitt líti› vi›førisstativ aftan.Ta› sigst at hesin bilurin var ein av fyrimyndunum hjá teimum sum tekna›u VW Bobluna*

### Hanomag 2/10 PS

HANOMAG

Motorurin
1 syl. 0,5 litur 10 hk

| | |
|---|---|
| Toppfer› | 60 km/t |
| Longd | 278,0 cm |
| Aksulfrástø›a | 192,0 cm |
| Eginvekt | 370 til 430 kg. (alt eftir typu) |
| Bremsur | Mekaniskar til bakhjólini |
| Transmissión | Einkult keta til bakaksulin |
| Undirvognur | 2 tvørliggjandi bla›fja›rar framman<br>dupultar koncentriskar skrúvufja›rar aftan |

Ta› sæst at búmerki er tekna› eftir Hanomag 2/10



*Hendan myndin er úr 75 ára minnisritinum, vi› hesum undirteksti: Gudmundur var mikil barnavinur. Her fáa børnini sær ein túr í bili hansara, sum manna millum var› róptur "Grísurin". Ta› var ein t‡skur Hanomag vi› træfelgum*



*Á hesi myndini eru børnini hjá Wenzel Petersen, Elsa og Petur (Pade), í Hanomag bilinum. Hví bilurin er hjá Wenzel Petersen vita vit ikki. Bilhandlarar tá vóru bert Wenzel Petersen og Vilhelm Nielsen, i› møguliga hava selt bilin, havt hann á verksta›, ella tiki› hann inn í b‡ti vi› annan bil*